# Grøna skjalið

*Yvirlýsing fyri arbeiðið hjá føroysku kommununum fyri burðardyggari menning*

Vit, føroyskar kommunur, vilja taka okkara part av ábyrgdini at fremja eina burðardygga menning í Føroyum og skriva tí undir hesa yvirlýsing.

**1. Grein**

Okkara mál er:

1. Ein burðardygg samfelagsmenning, sum tryggjar lívsgrundarlag og lívsgóðsku fyri núlivandi og komandi ættarlið,

2. At virksemi í býum og bygdum ikki ávirkar náttúruligu javnvágina hvørki í lokalum ella í globalum høpi.

**2. Grein**

Okkara upphavsstøði er:

1. Áheitanin frá ST umhvørvisráðstevnuni í Rio í 1992 til myndugleikar á staðnum um at fáa íbúgvar, felagskapir og vinnulív við inn í framskygdar virkisætlanir fyri lokalari burðardyggari menning (Lokal Agenda 21),

2. At myndugleikar á staðnum mugu taka ábyrgd av at fáa íbúgvarnar við í hettar arbeiðið og tryggja, at hesir eru við at taka avgerðir, átaka sær ábyrgd og luttaka aktivt,

3. At lokal luttøka er altavgerandi fyri burðardyggari menning, tí umhvørvis- og menningarspurningar verða best loystir í samstarvi við tey, sum beinleiðis verða ávirkað av hesum,

4. At avbjóðingin úr Rio á hendan hátt verður við til at menna nærdemokratiið í Føroyum.

**3. Grein**

Vit vilja:

1. Elva til, at íbúgvar, feløg og partarnir á arbeiðsmarknaðinum aktivt kunnu taka lut í Lokal Agenda 21 tilgongdini, at skapa netverk millum partarnar og hóskandi høvi fyri hesar at hittast,

2. Í gerandis virki arbeiða fyri, at øll, sum búgva og virka á staðnum kenna ábyrgd av burðardyggari menning,

3. Tryggja, at arbeiðið við burðardyggari menning er eyðkent av langskygni, samskipan og støðugum framburði,

4. Bera soleiðis í bandi at kommunu- og virkisemisætlanir verða praktisk og bindandi amboð í arbeiðinum fyri burðardyggari menning,

5. Eftirmeta og fylgja við tí arbeiði, sum er gjørt við burðardygga menning á staðnum, til dømis við at nýta umhvørvislyklatøl,

6. Arbeiða fyri opnum orðaskifti og samstarvi ímillum kommunur, land og stovnar, soleiðis at áhugamálini hjá hesum verða samskipað

**4. Grein**

Vit vilja leggja dent á at:

1. Skapa tilvitan um at neyðugt er at taka umhvørvisatlit í sambandi við alla vørunýtslu og alt vinnuvirksemi,

2. Hugsa vistfrøðina hjá bygdini ella býnum sum eina ringrás,

3. Minka um orkunýtsluna, nýta minni av jarðbundnum (fossilum) orkukeldum og meira av alternativum orkukeldum,

4. Menna byggisamtyktir, serliga í býum og tættbygdum økjum, sum minka um nýtsluna av lendi til grundstykkir og minka um bilferðsluna

5. Tryggja, at lívfrøðiliga margfeldið, sermerkt landsløg og náttúra verða varðveitt, samstundis sum grundarlag er fyri einum livandi lokalsamfelagi,

6. Vísa á samanhangin ímillum heilsu, umhvørvi og trivnað,

7. Greina hvussu kommunalt virksemi kann skipast, soleiðis at kommunurnar ganga á odda viðvíkjandi orkusparing og minking av skaðiligum árini á umhvørvið,

8. Samstarva við fólki úr øðrum londum og mentanum og á hendan hátt menna altjóða umhvørvissamstarvið,

9. Verja og varðveita mentanarminni og mentanarumhvørvi, sum eru partur av lokalum siðaarvi og samleika.

**5. Grein**

Vit mæla til:

1. At aðrar kommunur taka undir við hesi yvirlýsing innan árslok í 2010,

2. Samstarv við landsmyndugleikar- og stovnar á hesum grundarlagi,

3. At allar kommunur, sum hava tikið undir við hesi yvirlýsing, hittast í 2010 at leggja fram arbeiðið, sum er gjørt, og fyri at taka støðu til í hvønn mun hendan yvirlýsingin eigur at endurskoðast.